Bárður á Steig Nielsen
Beinir Johannesen
Jenis av Rana
Helgi Abrahamsen
Steffan Klein Poulsen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingsfólk

Broytingaruppskot III

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 90/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 8 verður orðað soleiðis:

"**8.** § 5, stk. 1-4 verða orðað soleiðis:
"Tá landsstýrisfólkið viðgerð umsókn um loyvi eftir § 4 til bygging av nýggjum verkum til elframleiðslu, skal atlit takast at landsins orkutørvi og orkupolitikki sambært § 11, stk. 3, umframt til rættin hjá SEV at gagnnýta vatnorkuna.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið lýsir alment eftir umsóknum um framleiðsluloyvi omanfyri 200 kW. Tó kann loyvi verða givið til framleiðslu av el úr vindorku, uttan at lýst er alment eftir umsóknum frammanundan. Metir landsstýrisfólkið, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsókn sambært 2. pkt. eigur at verða viðgjørd, skal landsstýrisfólkið gera av, at loyvi bert kann verða givið aftan á, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi við eini freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð.
Stk. 3. Umframt umsóknir sambært stk. 2, 2. og 3. pkt. kunnu hesar umsóknir um loyvi viðgerast og latast uttan alment útboð:
1) loyvi til framleiðslu úr sólorku á egnum bygningi,
2) royndarloyvi sambært § 4, stk. 4 í løgtingslógini,
3) leingjan av loyvi sambært § 4, stk. 2,
4) loyvi til framleiðsluverk upp til 200 kW, og
5) loyvi og leingjan av loyvum til skipanarberandi eindir hjá SEV.
Stk. 4. Avlop frá framleiðsluverkum upp til 200 kW ætlað til egna nýtslu, kann leiðast inn á elnetið."

Viðmerkingar:
Sambært galdandi lóg hevur landsstýrisfólkið heimild at skipa open-door útboð í sambandi við umsóknir, sum ikki hava verið partur av almennum útboði. Hesin møguleikin verður við lógaruppskotinum hjá landsstýriskvinnuni tikin úr lógini.

Flestu verandi vindmyllulundir eru komnar upp gjøgnum open-door útboð, og sambært hoyringum í Rættarnevndini hevur hesin møguleikin havt stóran týdning fyri, at útbyggingar eru gjørdar á økinum. Fært hevur eisini verið fram, at uttan henda møguleikan skulu vit ikki rokna við at síggja fleiri nýggjar vindmyllulundir í framtíðini.

Skotið verður tí upp, at møguleikin fyri open-door verður verandi í lógini.

Viðmerking til broytingina
Møguleikin fyri sokallaðu open-door verður settur inn í § 5, stk. 2, 2. og 3. pkt., og tí verður ásetingin, sum landsstýriskvinnan hevur skotið upp at broyta, orðað av nýggjum í hesum broytingaruppskotinum.

Á Løgtingi, 23. mai 2023

Bárður á Steig Nielsen	Beinir Johannesen
Jenis av Rana	Helgi Abrahamsen
Steffan Klein Poulsen	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur